## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av suðri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og sunnudagin eitt skifti regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Nýggjur skrivstovubygningur í Runavík

**Partur av handilsbygninginum hjá Teymavirkinum í Runavík verður umbygdur og lyftur upp. Bygningurin veðru innrættaður til skrivstovur, sum ætlanin er at leiga út**

BYGGING
*Edvard Joensen*

**Runavík:**
Ein nýggjur skrivstovu- og handilsbygningur verður nú bygdur í Runavík. Ella kanska meira at siga umbygdur, tí talan er um at gera eina hædd oman á ein verandi bygning og innrætta skrivstovu í honum.

Tað er bygningurin hjá Teymavirkinum, sum Leikabúðin hevur hildið til í, sum skal umbyggjast.

Rúni Berg, stjóri á Teymavirkinum, sigur, at ætlanin er at innrætta tvær tær ovaru hæddirnar, sum vera góðar 300 fermetrar hvør til víddar, til skrivstovur, meðan Leikabúðin kemur inn aftur í somu hædd, hon higartil hevur verið.

Tað verða fýra skrivstovuhøli á 50 fermetrar hvørt í hvørjari hæddini. Møguleiki verður tó at taka veggir niður, soleiðis at samanhangandi høli upp á 100 fermetrar fáast burturúr, um ynskt verður tað. Skrivstovurnar verða ávikavist niðan móti vegnum og oman móti havnarlagnum.

Eftir miðuni verður so gongd við tekøki og wc til hvørja eindina. Einki verður til felagsbrúk.

Í ovastu hæddini, sum eisini verður innrættað við fýra skrivstovum, verða kvistar settir omaná.

Yvir gongubreytini verður úthang, sum fólk fær gingið ella staðið turt undir, sigur Rúni Berg.

Enn er einki leigumál avtalað, sigur hann, men vónar tó, at tað man fara at koma, til bygningurin verður liðugur, væntandi í mars mánaða komandi ár.

Tað er eingin skrivstovubygningur til útleigan tøkur í býnum, sigur Rúni Berg, sum metir, at tørvur er á einum slíkum.

Hann vil ikki siga, hvat umbyggingin fer at kosta, men ásannar tó, at tað verður helst ikki bíligt.




*Ein hædd verður gjørd oman á bygningin, sum Leikabúðin hevur hildið til í, og bygningurin verður innrættaður til skrivstovur*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 22 |
| Halifax | 18 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 22 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 23 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 32 |
| Malta | 37 |
| Tunis | 38 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1011 hPa yviri á Suðurlandinum fer í landnyrðing og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.




Lágtrýstið yvir sunnara Norðsjógvin fer spakuliga norðureftir, men brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum eystan fyri Føroyar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/08 kl. 06⁰⁰– 07/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,8°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 06/08 kl. 06⁰⁰– 07/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 6,7 mm




BILLUTIR



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

### VESTFALLSKYRRINDI

8. aug.: Tendring
10. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. aug | 07.02 | 19.28 | 06.02 | 18.28 | 06.17 | 18.43 | 09.02 | 21.28 | 10.02 | 22.28 | 05.17 | 17.43 |
| 9. aug | 07.53 | 20.19 | 06.53 | 19.19 | 07.08 | 19.34 | 09.53 | 22.19 | 10.53 | 23.19 | 06.08 | 18.34 |
| 10. aug | 08.43 | 21.07 | 07.43 | 20.07 | 07.58 | 20.22 | 10.43 | 23.07 | 11.43 | — | 06.58 | 19.22 |
| 11. aug | 09.32 | 21.57 | 08.32 | 20.57 | 08.47 | 21.12 | 11.32 | 23.57 | 00.07 | 12.32 | 07.47 | 20.12 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. aug | 04.17 | 16.43 | 07.17 | 19.43 | 08.17 | 20.43 | 06.47 | 19.13 | 08.02 | 20.28 |
| 9. aug | 05.08 | 17.34 | 08.08 | 20.34 | 09.08 | 21.34 | 07.38 | 20.04 | 08.53 | 21.19 |
| 10. aug | 05.58 | 18.22 | 08.58 | 21.22 | 09.58 | 22.22 | 08.28 | 20.52 | 09.43 | 22.07 |
| 11. aug | 06.47 | 19.12 | 09.47 | 22.12 | 10.47 | 23.12 | 09.17 | 21.42 | 10.32 | 22.57 |

5 707265 100043 >